


# ELEKTRIKARI TIL NORRÖNU

## Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Smyril Line søkir eftir elektrikara til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu skipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferða fólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til elektrikara**
- Elektrikara/el-innleggjara útbúgving, skipselektrikari ella royndir frá skipum er ein fyrimunur
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevnir

**Lønar og setanartreytir**
Sambært sáttmála millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið fyri farmaskip. Møðuligt lønarískoyti kann avtalast

Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir frá størri skipum, men hetta er eingin treyt.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

chief.engineer@norrona.fo

ella

**SMYRIL LINE**
Maskinstjórin
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 4. februar 2008

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heðin Mortensen maskinstjóra á:

+298 34 48 46 ella
chief.engineer@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noregi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO

WWW.SMYRIL-LINE.FO




# SKIPSASSISTENTUR TIL NORRÖNU

Smyril Line søkir eftir skipsassistenti til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt fjølbroytt starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni.

Aftrat góðum starvstreytum, bjóða vit góða løn og góða frítíðarskipan. Ein máni til arbeiðis, gevur ein mána frí – við løn.

**Førleikakrøv skipsassistent:**
- Vera hegnigur, ágrýtin og røkin
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni

**Arbeiðsuppgávur:**
- Alt vanligt skipsarbeiði
- Høvuðsuppgávan er omandekks viðlíkhald, so sum máling og reingerð.

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum avvarandi fakfelag og Føroya Reiðarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til:
crew@smyril-line.fo ella sendast í brævbjálva til Smyril Line.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi **30. januar 2008**.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heðin Mortensen, maskinstjóra á:
+298 34 48 46 ella
crew@smyril-line.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO

WWW.SMYRIL-LINE.FO